

Meridian Spirit. Mynd: Jens Kr. Vang.

# Føroyskur skipari umborð á gasstangaskipi í Nólsoyarfirði

Hallur av Rana

18.02.2015 - 10:52

Oljan.fo

Nógv havnarfólk stóðu eitt sindur spyrjandi í gjár, tá eitt ókent skip kom siglandi inn eftir Nólsoyarfirði og legði seg uttanfyri Havnina. Í myrka vetrarkvøldinum lýsti skipið væl upp og kundi síggjast langan veg frá.

Talan er um gasstangaskipið Meridian Spirit, ið vanliga siglir millum Norra og Miðjararhavið. Sambært heimasíðuni marinetraffic.com, so varð skipið bygt í 2010, og er okkurt um 285 metrar langt og 43 metrar breitt.

Portalurin hevur tosað við skiparin umborð, ið er føroyingurin Dánjal Pauli Lisberg. Hann greiðir frá, at skipið er millum túrar og liggur og bíðar eftir last.

Tað er kanadiska reiðaríið Teekay, ið eigur skipið, sum siglir undir donskum flaggi